# Fleiri føroysk met




*Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, setti nýtt føroyskt met og juniormet í 50 metra firvaldasvimjing*

Hóast greiða tapið í landsdystinum, sum gjørdi fleiri av føroyingunum bart.

Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, setti nýtt føroyskt met og juniormet í 50 metra firvaldasvimjing. Hann var nummar fremstur við tíðini 24.95 sekund. Hann átti somuleiðis gamla metið, sum var 25.17 sekund. Hann er fyrsti føroyingur, sum svimur teinin undir 25 sekund. Magnus Jákupsson tryggjaði sær gullnálina við úrslitinum.

Astrid Foldarskarð, FLOT, setti nýtt føroyskt juniormet í fyrstu kappingini í 50 metra firvaldasvimjing. Tíðin var 29.63 sekund. Foldarskarð átti eisini gamla metið, sum var 30.05 sekund, sum var sett í mai í ár. Tað er ein greið framgongd.

Jón Hofgaard, Suðuroyar Svimjifelag, setti nýtt juniormet í 100 metra bringusvimjing við tíðini 1:06.50. Hann var næstur íslendska Jakob Jóhann Sveinsson, sum vann kappingina. Á úttøkustevnuni til landsdystin í september svam Hofgaard sama teinin við tíðindini 1:08.53. Pál Joensen átti gamla juniormetið frá november 2008 við tíðini 1:07.20. Pál Joensen eigur føroyska metið við tíðini 1:05.50.

Birita Debes, FLOT, setti nýtt føroyskt og juniormet í 100 metra rygg. Tíðin var 1:03.15. Hon átti gamla juniormetið frá føroyameistarastevnuni í mai í ár, tá hon svam teinin við tíðini 1:04.72. Elspa Mørkøre átti føroyska metið við tíðini 1:03.78.

*uni@sosialurin.fo*



*Tað vóru oftast fleiri sekund, sum skiltu íslendingarnar frá føroyingunum*

# Íslendingarnir svumu skjótari

**SVIMJING** Íslendingarnir vunnu greitt landsdystin móti føroyingum í vikuskiftinum

Uni Holm Johannesen

98 stig til Ísland. 80 stig til Føroyar.

Tað var endiliga úrslitið í landsdystinum millum Ísland og Føroyar, sum varð avgreiddur í Laugardalslaug svimjihøllini í Reykjavík leygardagin.

Tað var skjótt greitt, at íslendingar fóru at vinna.

Shaila millum Garðarnar, Pauli Ø. Mohr, Poula Ø. Mohr og Cecilia Eysturdal noyddust at geva avboð, orskað av arbeiði og øðrum. Kári á Høvdanum og Mona Simonsen, sum áður hava umboðað Føroyar í aljtóða høpi, eru givin at svimja, og tí vóru tey ikki við.

Ísland hevði allar svimjararnar, sum eru ovast á styrkislistanum í Íslandi, tøkar.

Føroyski hópurin var ungur. Tríggir vóru seninorar, fimm vóru juniorar, og hini átta eru eitt, tvey og trý ár undir veruligan junioraldur.

Ísland hevði 11 seniorar, tríggjar juniorar og tveir undir veruligan junioraldur í sínum hópi.

## Vunnu greitt

Tað vóru oftast fleiri sekund, sum skiltu íslendingarnar frá føroyingunum.

Føroysku svimjararnir gjørdu hinvegin bart í liðsvimjingini á átta ferðir 50 metra frí. Tað var strævnasti teinurin í landsdystinum.

Næstbesta liðið hjá Ísland varð kolldømt, og Føroyar áttu tí ovasta og triðbesta liðið í hesi kappingini. Ísland misti øll síni stig, sum næstbesta liðið upprunaliga tryggjaði teimum.

Samanumtikið var íslendenski sigurin greiður. Í støðum var klassamunur. Serliga á breiddini vann Ísland fleiri stig. Tað sást serligt, tá bæði liðini vunnu hvør sínar seks einstaklingakappingar, og vinnandi stigini komu tí frá hinum plássunum og liðsvimjingunum.

## Vunnu seinast

Tað er hinvegin ikki meira enn eitt ár síðan, at Føroyar vunnu samlaða landsdystin móti Íslandi. Tað var í Gundadali í Havn. Tá var úrslitið 101-79.

Tað er longu nú greitt, at liðini hittast aftur í oktober í 2011 í svimjihøllini í Gundadali.

*uni@sosialurin.fo*